# Eli Frederiksen 70



Sunnudagin 19. apríl fyllir Eli Frederiksen, fyrrverandi borgarstjóri í Porkeri, 70 ár.

Eli er føddur 19. apríl 1939 í Miðvági, sonur Sigmund Frederiksen úr Miðvági og Almu f. Heinesen úr Sandavági. Eli giftist í 1963 við við Sonju Daniu f. Müller úr Porkeri, og eiga tey tveir synir.

Eli er skrivstovulærdur á Føroya Fiskasølu í 1958, og sama ár fekk hann handelsmedhjælpereksamen frá Tórshavnar Handilsskúla, umframt at hann gekk eitt ár á Købmandsskolen í Keypmannahavn.

Í 1967 tók hann læraraprógv á Føroya Læraraskúla og var síðani lærari í Tórshavnar Kommunuskúla frá 1967-72, í Vági 1972-74 og við Miðvágs/Sandavágs skúla frá 1974-76.

Í 1976 fluttu Eli og Sonja við synunum Sigmundi og Sakarisi til Porkeris at búgva, har Eli fekk starv sum lærari. Hann fór frá fyri aldur fyri góðum tveimum árum síðani. Við síðuna av lærarayrkinum hevur Eli saman við konuni rikið Suðuroyar Bókhaldsvirki.

Eli hevur verið virkin í síni tíð í Porkeri. Hann var valdur inn í bygdarráðið í 1980, har hann framvegis hevur sæti. Frá ár 2000 til 2008 røkti hann sessin sum borgarstjóri. Fyri kommununa hevur Eli verið í umboðsráðnum hjá SEV, og frá 2005 til 2008 nevndarlimur í SEV.

Eisini hevur Eli verið virkin á vinnulívsøkinum, m.a. var hann høvuðsstigtakari til Porkeris Roykivirki, har saltfiskur verður virkaður í dag. Í eini lítlari bygd sum Porkeri hevur eitt slíkt arbeiðspláss stóran týdning og styrkir eisini um inntøkugrundarlagið hjá kommununi.

Saman við øðrum keypti Eli fyrst í 90-unum rækjutrolaran South Island, har hann eisini var reiðari. Fyrst eitt skifti á gamla South Island og seinni á nýggja South Island, sum tíverri ikki kláraði kreppuna, sum rækjuflotin kom í fyri nøkrum árum síðani.

Eli verður burturstaddur føðingardagin.

# 40 ár í Timburhandlinum



Jóhannus Hansen hevur starvast í Timburhandlinum í Runavík í 40 ár.

Í hesari vikuni fyri 40 árum síðani, fór ein ungur maður í Runavík til arbeiðis í Timburhandlinum í Runavík fyri fyrstu ferð, og hann er har enn.

Vit tosa um Jóhannus Hansen, Jóhannus hjá Ydda, sum vit eisini kenna hann.

Jóhannus er eitt álit, har hann er. Hvønn morgun og altíð í góðari tíð, er hann farin til arbeiðis og tíbetur hevur hann verið signaður við einari góðari heilsu, so fáir eru dagarnir, hann ikki hevur verið at sæð í Timburhandlinum.

Tey nógvu árini hevur Jóhannes verið bilførari og fer hann ein túr í oynni, so kann hann peika á nógv hús, har hann koyrdi viðin til húsini og bar viðin uppá pláss.

Seinnu árini hevur hann starvast sum avgreiðslumaður, arbeitt á sagverkinum og annað fyrifallandi arbeiði, tí fittur er hann í hondunum, skilamaður og góður hjá kundunum at koma til í allar mátar og væl egnaður til tað starv, honum var litið í hendur.

Altíð er hann tann sami javni, fjálgi Johannus, tá tú kemur til hansara við onkrum fyrispurningi ella umbøn um eina hjálpandi hond. Tú kennir teg væl saman við Jóhannusi.

Jóhannus og Hansa eiga 4 døtur, 9 abbabørn og 1 langabbabarn og er Jóhannus góður at heita á á arbeiðsplássinum, so er hann tað ikki minni, tá um familjuna ræður.

Mangir munnu tímarnir vera, har Jóhannus hevur rætt døtrunum eina hjálpandi hond.

Tað eru tær eisini takksamar fyri, so segði hann, ongin ivi um tað.

Kemur Jóhannus inn á gólvið til ein kaffimunn, so er skjótt at látur er at hoyra, tí hann minnist væl og dugir sera væl at siga frá hendingum av sjógvi og landi, tí Jóhannus sigldi í fleiri ár, til hann legðist uppi á landi og fór í Timburhandilin.

Nú eru so 40 ár runnin og árini siga frá, at Jóhannus er við at gerast "pensjonist", men enn finna vit henda fjálga runavíkingin í Timburhandlinum hjá P/F Borg.

***Jóannes Símunarson Hansen***

# Maria Berg Jacobsen
## Søldarfjørður
## f. 19.04.24 – d. 17.06.08



**Mamma okkara hevði fylt 85 ár 19. april 2009, vit høvdu vónað at havt hana nøkur ár afturat, men soleiðis bleiv ikki. Harranum líkaði at taka hana heim til Sín hin 17. juni 2008 eftir stutta sjúkralegu.**

*Í hesum sambandi vilja vit endurtaka tað, sum vit bóru fram til jarðarferðina, sum seinastu heilsan til mammu:*

"Góða høgt elskaða mamma, vit duga ikki at skilja, at tú ikki er ímillum okkum meira, og vit mugu síggja í eyguni, at vit ongantíð aftur her á fold sleppa at njóta eina løtu saman við tær. Tað er so hart at siga farvæl til ein sum man elskar, og ein sum hevur elskað okkum so nógv sum tú gjørdi. Tú var heimsins besta mamma, og tá tú var ein so ótrúliga góð og vøkur mamma, so er saknurin so stórur og sorgin so nívandi. Í sorgini kunnu vit tó ugga okkum við, hvussu hepnar vit vóru at hava teg sum mammu og gleðast yvir øll tey ár, vit fingu saman við tær.

Góða mamma, á ungum árum fann tú út av, at skuldi tú liva eitt gott og gevandi lív, so mátti tú hava tann størsta lærumeistaran av øllum við tína lið, og úti í salinum í Søldarfirði fann tú hendan lærumeistaran, sum tú fylgdist við alt títt lív, ja heilt til síðsta andadrátt.

Trúgv tín á tann stóra Faðirin og Skaparan kom at hava stóra ávirkan á teg sum menniskja, tí alt sum tú gjørdi og segði var av tí góða, og øll sum fylgdu tær gjøgnum lívið vistu, at tú ikki bara hevði trúnna, men at tú livdi, sum tann tú var, og at trúgv uttan verk er deyð trúgv. Og alt tað góða og vakra, sum tú fekk við at fylgjast við Jesusi, tað vildi tú deila við øll, fyrst og fremst við pápa og okkum systrar, men eisini til onnur, sum tú møtti á lívsleiðini.

Góða mamma, tú gav lív til 4 gentur og kallaði tú okkum tínar rósur. Eingin urtagarðsmaður hevur nakrantíð røkt sín urtagarð betur enn tú. Frá tí, at vit vóru lítlar spýrar gjørdi tú tær stóran ómak at leggja tað góða og vakra í okkum. Tú fortaldi okkum, hvussu umráðandi tað var at virða og respektera øll menniskju líkað , høg sum lág, hvussu umráðandi tað var at vera rættvís og ærlig og minti okkum alla tíðina á at vera fyrikomandi, fólkalig, blíð og hjálpsom. Men mest av øllum so vísti tú okkum á, hvussu umráðandi tað var at hava Jesus, sum sín vin og fylgissvein.

Tú var "strong" við okkum, men setti ikki hegn upp fyri at vísa hvar mørkini gingu. Tú gav okkum álit og frælsi til at finna okkara pláss her í lívinum. Tú virdi okkara ynski og val og fylgdi sera væl við, hvussu tað gekk okkum í lívinum, tú lurtaði við stórum áhuga – jú tú var tann stóri ráðgevi, sum vit altíð kundu fara til, tí tú hevði stóra vitan og vísdóm.

Í 1985 følnaði ein stór og vøkur rósa í tínum urtagarði, tá misti tú tín høgtelskaða mann og vit okkara elskaða pápa. Hetta varð ein svárur missur fyri okkum øll, tí pápi var eitt einastandandi gott menniskja.

Seinni møtti tú Dávur, sum tú fekk 20 góð ár saman við. Líkað so góð sum tú hevur verið við Dáva, líkað so góður hevur hann verið við teg og okkum øll. At Dávur hevur mist teg nú, er hart fyri hann, men hann skal vita, at hann ikki verður gloymdur av okkum.

Góða mamma, vit eru tær so takksamar fyri alt tú hevur gjørt fyri okkum, og fyri alt tú hevur lagt í okkum. At syrgja hevur sína tíð, men tá tað ringasta hevur lagt seg, so kunnu vit allar minnast aftur á og takka Gudi fyri, at hann gav okkum eina so góða mammu.

Nú tú hevur latið aftur urtagarðsportrið her á fold og latið stóra Himmalportrið upp, hevur tú nógv at vera stolt yvir, tín urtagarður er væl røktur. Umframt okkum fýra við makum, so er Dávur, øll tíni ommu- og langommubørn her, tú hevur familjuna, vinir og kenningar og øll tey, sum tú hevur stuðlað og hjálpt, øll hava fingið so nógv frá tær, tí tú syrgdi alla tíðina fyri at øll, sum vóru rundan um teg fingu umsorgan. Tú var tað góða urtagarðsfólkið, sum fekk alt at vaksa rundan um teg. Tú sáddi við kærleika, lúkaði við nærveru, vætaði við Guds orði og vardi okkum øll við tínum bønum.

Góða elskaða mamma, túsund takk fyri alt tú hevur gjørt og verið fyri okkum, okkara makum, børnum, -ommu- og langommubørnum.

Friður verður við okkara høgt elskaðu mammu".

***Elma, Oðny, Sunnuvá og Malan***

# Bryndis
## 1994-2009



Fyrsta várdag, 22/2-2009, tá várvónirnar vakna, tá fyrstu blómurnar kaga upp úr moldini, ja, tá bórust sorgarboðini: Bryndis Unadóttir, okkara kæri næmingur og floksfelagi, var ikki okkara millum longur; hon var flutt yvir í aðra tilveru.

Hví? spyrja vit. Ein ung genta, ikki fylt 15 ár, í lívsins vári; hví skuldi hon longu leggja árarnar inn? Vit hava einki svar, kunnu bert drýpa høvur í sorg og leggja spurningar og svar í Harrans hendur.

Bryndis kom í Argja skúla mitt í 2. flokki, og hevur hon sostatt gingið í okkara skúla meginpartin av síni skúlatíð. Viðmælið, sum hon fær frá næmingum og lærarum, er m.a.: ein glað, smílandi, jalig, stuttlig, dugnalig og sjálvbjargin genta.

Hon var eisini virkin í ymiskum uttan fyri skúlan, t.d. í kapproðri og í "Teensing"-kórinum, sum sang so vakurt og hugtakandi í Vesturkirkjuni og í kirkjugarðinum.

Hóast hon var sjúk, so var tað ikki nakað, vit merktu í tí dagliga. Vit høvdu gott samstarv við heimið, og vit hava eisini fingið kunnleika um sukursjúkuna, sum Bryndis hevði.

Bryndis dugdi at síggja týdningin av ymiskleikanum hjá øllum menniskjum. Hon dugdi eisini at tala at, um okkurt órættvíst fór fram, og hon tordi og dugdi at siga tað, bæði við flokk og lærara. Haraftrat var hon sera dugnalig fakliga, og tað var altíð lív í, har hon var.

Hjartanemandi vóru minningarløturnar í Argja skúla. Tann fyrra var, tá floksfelagar, lærarar, prestur og foreldur Bryndisar hittust í skúlastovuni. Seinna løtan var, tá allur skúlin, saman við presti og vinfólkum hjá Bryndis, savnaðust í miðhøll skúlans. Tá høvdu floksfelagar hennara gjørt eina myndatalvu við myndum av henni, har tey eisini høvdu skrivað sera vøkur orð um hana. Haraftrat hava vit seinni havt vakra næmingasangframførslu til minnis um Bryndis.

Mikla mannfjøldin, sum var til jarðarferðina, vísti eisini, at Bryndis hevði nógvar vinir og kenningar. Hugrørandi var eisini at síggja floksfelagar og aðrar vinir geva henni rósur sum eina seinastu heilsan.

Í sváru sorgini kunnu vit liva í vónini, sum kór hennara so vakurt sang um við grøvina: "We´ll meet again"!

Góðu foreldur, Pætur og familjan annars!

Vit minnast Bryndis við takksemi. Harrin styrki tykkum í sorgini!

***Vit í Argja skúla***